Fróðskaparsetur Føroya

13. juni 2008

# Fundarfrágreiðing til setursráðsfund nr. 6/2008

Dagur og klokkutíð: Tórsdagin 12. juni 2008, kl. 13-15.30

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Hans Pauli Joensen, vararektari og megindeildarráðsf. fyri NVD
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Malan Marnersdóttir, megindeildarráðsf. fyri FMD
Rúna Hjelm, setursskrivari
Winny í Pætursastovu, varasetursskrivari (til staðar undir málsviðgerðini av máli 3)

**1. Gjøgnumgongd og góðkenning av 5/2008 setursráðsfundi 27. mai 2008.**
Góðkend

**2. Góðkenning av dagsskrá.**
Góðkend

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

**3. Fíggjarmál:**
**a. Fíggjarløgtingslóg 2008.** (J.nr. (3) 10-12-20070008).
**b. Fíggjarætlan fyri 2009.** (J.nr. (3) 10-11.01-20070004).
3.a. og 3.b. Setursskrivarin skrivar til deildirnar og biður um at fáa fíggjartøl fyri leysalærarar og rakstur fyri 2008 og 2009. Harafturat skulu deildirnar gera fíggjarætlanir fyri 2009. Setursskrivstovan roknar út væntaðu lønarútreiðslurnar fyri 2008 og 2009, lønarútreiðslur og rakstur á Setursskrivstovuni og ger eina samlaða fíggjarætlan fyri alt Fróðskaparsetrið. Freistin, sum Mentamálaráðið hevur givið Fróðskaparsetrinum til arbeiðið við fíggjarætlanini, er sett til 04.07.2008. Hetta var mett at verða ov stutt freist, og setursskrivarin skal tí søkja um at fáa freistina longda. Setursráðið hevur ein fyrireikandi fund um fíggjarætlanina tann 03.07.2008.

**4. Lektari í støddfrøði.** (J.nr. (3) 10-21.04-20070003).
Setursráðið hevur samtykt at bjóða Gunnari Restorff starvið sum lektari í matematikk á Náttúruvísindadeildini.

**5. Umsókn frá Turið Sigurðardóttur um fíggjarligan stuðul til ráðstevnuritið Frændafundur 6.** (J.nr. (3) 10-19-20070004).


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

Møguleikin við at játta úr Grunni Onnu Djurhuus varð umrøddur, og samtykt varð at játta, um peningur enn er til taks í grunninum.

6. **KT-ráðið á Fróðskaparsetrinum. Setrið skal velja tvey umboð í ráðið.** (J.nr. (3) 10-01-20070017).

Samtykt varð at seta Winny í Pætursastovu, varasetursskrivara og Petur Zachariassen, lektara sum umboð í KT-ráðið.

7. **Námsferðarstuðul 2008. Støðutakan til umsóknir.** (J.nr. (3) 10-52-20070003).

Samtykt varð, at fyrisitingin saman við rektaranum avgreiðir málið um námsferðastuðul.

8. **Hølisviðurskifti í Ovastovu.** (J.nr. (3) 10-33-20070001).

Samtykt varð, at Hans Pauli Joensen útvegar tilboð uppá umbygging av skrivstovuhølinum í Ovastovu til nýggju KT-frøðingarnar.

9. **Kunning frá deildunum o.ø.:**

a. **Fundur á Føroyamálsdeildini 4.6.2008.** (J.nr. (3) 10-01-20070002).

Tikið til eftirtektar.

10. **Kunning frá Føroyamálsdeildini um tillagaðar námsskipanir.** (J.nr. (3) 10-41-20070005).

Føroyamálsdeildin hevur endurskoðað námsskipanina og gjørt ávísar broytingar fyri støðisnámið. BA-árið og MA-námið eru óbroytt, men nærri er tilskilað, hvussu sjálvlestur verdur avgreiddur. Sum nakað nýtt hava MA-lesandi á Føroyamálsdeildini fingið møguleika at søkja um góðskriving av námsstigum fyri luttøku á ávísum ráðstevnum.

11. **Ymiskt:**

a. **Kunning frá Føroyamálsdeildini um viðgerð av t-brøvum við útbúgvingarfyrispurningum**

b. **Kunning frá Føroyamálsdeildini um reglur fyri nýtslu av teldum undir próvtøku**

c. **Kunning um støðuna viðvíkjandi fyrireiking av útbúgvingunum á Náttúruvísindadeildini**

**Avgreiðslumál:**

12. **Metingarnevndir at staðfesta:**

a. **KT-størvini á Náttúruvísindadeildini:** (J.nr. (3) 10-21.04-20070006).
Deildin arbeiðir við at finna fólk til metingarnevnd

b. **Málfrøðingastarvið á Føroyamálsdeildini: Höskuldur Þráinsson, professari, Háskóli Íslands, Michael Barnes, professari emeritus, London, Þóra Björk Hjartardóttir, dosentur, Háskóli Íslands. Um onkrum av omanfyrinevndu berst frá: Helge Sandøy, professari, Universitetið í Bergen, Jonna Louis-Jensen, professari emeritus, Keypmannahavn.** (J.nr. (3) 10-21.03-20070003).
Metingarnevndin staðfest. Metingarnevnd og umsøkjarar fáa boð um, at setanin er útsett til nýtt fíggjarár vegna vantandi játtan á verandi fíggjarlóg.

c. **Bókmentafrøðingastarvið á Føroyamálsdeildini: Anne-Kari Skarðhamar, fyrstiamanuensis, Høgskolen i Oslo, Vésteinn Ólason, professari, stjóri á Stofnum Árna Magnussonar, Háskóli Íslands, Idar Stegane, professari emeritus, Bergen. Um**

**onkrum av omanfyrinevndu berst frá: Dagný Kristjánsdóttir, professari, Háskóli Íslands.** (J.nr. (3) 10-21.03-20070004).
Metingarnevndin staðfest. Metingarnevnd og umsøkjarar fáa boð um, at setanin er útsett til nýtt fíggjarár vegna vantandi játtan á verandi fíggjarlóg.

**d. Ph.D.ritgerð hjá Sólfinni Hansen: Bo Almqvist, professari emeritus, University College, Dublin, Vésteinn Ólason, professari, stjóri á Stofnum Árna Magnussonar, Háskóli Íslands, Malan Marnersdóttir, professari, megindeildarleiðari á Føroyamálsdeildin.** (J.nr. (3) 10-62.01-20070004).
Próvnevndin staðfest.

**13. Roknskapir 2007 at góðkenna og undirskriva:**

**a. fyri Fróðskaparsetur Føroya sum sjálvsognarstovn** (J.nr. (3) 10-16-20070004)

**b. fyri Grunn Onnu Djurhuus til áminnis um Sverra Fon** (J.nr. (3) 10-16-20070005).

Roknskapirnir fyri Fróðskaparsetur Føroya sum sjálvsognarstovn og Grunn Onnu Djurhuus vóru góðkendir og undirskrivaðir.

**Kunningarmál:**

**14. Stýringsbólkur fyri TACIT-verkætlanina, sum er uppfylging av veðurlagsráðstevnuni í Norðurlandahúsinum í apríl, er settur. Hans Pauli Joensen er valdur sum eitt av umboðunum fyri vísindaumhvørvið.** (J.nr. (3) 10-01-20070016).
Tikið til eftirtektar.

**15. Frágreiðing frá Kinga Kolarz, Pólandi, sum hevur verið á námsferð her í mai/juni. Hon fekk námsferðarstuðul.** (J.nr. (3) 10-52-2007003).
Tikið til eftirtektar.

**16. Ársfrágreiðingar:**

**a. University Life 2007, Københavns Universitet**

**b. Årsskrift, Carlsbergfondet 2008**